# Spurningar og svar – útboð av ráðgeving og fyriskipan av sølu av Tjaldri

1. Í brotinum um minstukrøv til veitarar, ið vilja geva tilboð verður m.a. nevnt í næst síðsta broti: "…og skjøl og tilvísingar, ið prógva, at teir lúka nevndu krøv". Hvørji skjøl og tilvísingar kundu her verið talan um?

   Svar: Talan er um upplýsingar, sum vissa um, at viðkomandi førleikar og royndir eru til staðar. Tað kann vera upplýsingar um fyritøkuna og persónarnar, t.d. hvat virksemi teirra fevnir og hevur fevnt um, eitt sonevnt cv, frágreiðing um ítøkiligar royndir o.tíl.

2. Hvørjir upplýsingar verða tøkir um P/F Tjaldur? Sum tit nevna, so er P/F Tjaldur eitt samtaksfelag har partur av virkseminum fer fram í dótturfeløgum og eru dótturfeløg her nevnd í tilfarinum. Hesi dótturfeløg gera so aftur íløgur í onnur feløg.
   a. Í hvønn mun verða upplýsingar latnir ráðgevanum um íløgurnar hjá Tjaldur og dótturfeløgunum, sum ikki annars eru almennar? Hesir upplýsingar kunnu hava týdning í sambandi við virðisásetingina av Tjaldur
   b. Í hvønn mun verða upplýsingar latnir ráðgevanum um P/F Tjaldur og dótturfeløgini, sum ikki annars eru almennir?
   c. Í hvønn mun verða upplýsingar latnir ráðgevanum um partaeigararnar í P/F Tjaldur og í dótturfeløgnunum hjá P/F Tjaldur?

   Svar: Upplýsingar, sum Fíggjarmálaráðið hevur og kann útvegað, verða latnar veitaranum, sum skal standa fyri ráðgevingini og fyriskipanini av søluni av P/F Tjaldur. Grundarlagið fyri arbeiðnum hjá veitaranum er í høvuðsheitum alment atkomuligar upplýsingar og annars upplýsingar, sum Fíggjarmálaráðið kann fáa til vega sum eigari av ognarlutinum í P/F Tjaldur.